# Fyrsti Skálaberg kostaði 66.000 kr.

SKÁLABERG

**Sosialurin, Klaksvík:** Tað er eitt lop upp á 70 ár og 166 milliónir millum tann fyrsta Skálaberg og nýggja Skálaberg sum júst er farin til fiskiskap.

Tá J.F. Kjølbro og Chr. Holm Jacobsen í 1933 keyptu fyrsta Skálaberg úr Onglandi kostaði hann klárur at sigla 66.000 krónur. Tá var hann 20 ára gamal, bygdur í 1913. Hann var eitt tað fremsta fiskifar í landinum og hann var í reiðarínum í 18 ár til hann mátti lúta fyri høgu kolprísunum fyrst í fimtiárunum. Hann varð seldur aftur til Onglands í 1951.

Nýggi Skálaberg kostar góðar 165 milliónir krónur.

Tann næsti Skálaberg, sum kom til landið 22. desember 1956 kostaði 4,8 milliónir krónur. Hetta var hildið at vera ovurhonds nógv og tað vóru fleiri sum roknaði við, at hann fór ikki at standa seg. Søgan hjá hesum skipi vísti nakað heilt annað.

Triði Skálaberg, sum kom til landið í 1976 kostaði 29 milliónir krónur. Hetta var í teim døgum, tá Thulesen ráddi hjá Kjølbro.

Fjórði Skálaberg, sum kom til landið í 1989 kostaði 103 milliónir krónur.

**je**



# Skálaberg sær ikki út av nógvum

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Sosialurin, Klaksvík:** Navnið, ið Jógvan Kjølbro valdi til sína fyrsta trolara seint í 1933 og sum nú hevur verið navnið á ikki færri enn fimm trolarum í Klaksvík sær ikki út av nógvum. Hví hann júst hevur valt navnið Skálaberg, er ikki eydnast at fáa uppspurt enn.

Staðarnavnið Skálaberg er ikki annað ein ein lítil klettur við bryggjuna á Oyri og hetta lítiðlætna berg hevur lagt navn til nøkur av frægastu fiskiførum okkara í sjeyti ár. Men fiskiligt man staðarnavnið Skálaberg hava verið og kanska onkur seiður er syftur har á leiðini.

Næsta trolaranavnið tekur Kjølbro eisini av Oyri. Tað er Næraberg, sum eisini er so lítið, at millum menn verður tað ikki roknað sum nakað berg. Næraberg varð bumbusprongdur undir krígnum. Hann kom í 1939 og sakk í 1941

So verður farið úr í Svínoy eftir triðja navninum. Tað er Dragaberg og hesin trolarin kom til Føroyar í 1946.

Fjórðu ferð Kjølbro keypir trolara og hetta er samstundis fyrsti nýbygningurin verður farið til Hattarvíkar og higani kemur navnið Sjúrðarberg.

Fimta trolaranavnið hjá Kjølbro kemur av Viðoynni. Tað er Sundaberg syðst á Viðoynni inn í Sund. Fyrsti Sundaberg varð keyptur í 1964 úr Vestmanna og at Jóhannes Fonsdal.

Teir trolarar sum síðan hava hoyrt til Kjølbro hava verið endurtøkur av nøvnunum Skálaberg, Sjúrðarberg, Sundaberg og Næraberg.



*Hanus í skiparastólinum á Skálaberg mánakvøldið tá skipið kom til landið*

*Mynd Jens Kr. Vang*

Reiðarin:

# Tveir trolarar í Barentshavinum

SKÁLABERG

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Sosialurin, Klaksvík:** JFK-trol hevur ongar ætlanir um at selja Sundaberg, nú nýggi Skálaberg er komin við so stórari orku, at hann lættliga kann fiska kvotuna hjá báðum skipunum í Barentshavinum.

- Okkara reiðarí hevur ikki altíð havt góðar royndir av at selja skip. Sjúðarberg varð seldur, tá tað sá so svart út í Barentshavinum seinast í sjeytiárunum. Fiskiloyvi hjá hesum skipinum er enn virkið í samfelagnum og hevur framleitt stór virðið seinastu 25 árini. Hesin trolari skuldi ongantíð verið seldur. Vit fara at behalda bæði skipini og fara at finna nýggjar veiðumøguleikara fyri Sundaberg, tá hann ikki eru eystanfyri, sigur Hanus Hansen, stjóri á JFK-trol.

Hanus Hansen er ein maður við dirvi og tað eru stór tøl hann arbeiðir við. Og hann er ikki bangin fyri at ganga nýggjar leiðir. Næraberg er eitt dømi. Ein risatrolari, sum mannliga stríðist fyri tilverugrundarlagnum alt eftir hvar í svartkjafturin er staddur her í landnyrðingspartinum av Norðuratlanshavi. Skálaberg er júst komin til landið. Hann er ein av heimsins størstu, um ikki størsti toskatrolarin og hetta skipið er spekkað við nýhugsan og næstan ein framtíðardreymur at líta á. Hanus sær troyttur út, nú hann situr í skiparakamarinum umborð á Skálaberg, mánakvøldi og skipið hevur ligið tveir teir fyrstu tímarnar við Kósabrúnna og hvílt seg eftir moyggjaferðina heim. Fyri løtu síðan stóð hann á brúgvaveingingum og talaði til stóra mannfjøld, sum var samankomin at taka móti nýggja Skálaberg, akkurát líka sum í 1957, 1976 og 1989. Hann segði millum annað:

- Í 1976 fór eg á fyrsta sinni í Barentshavið og framtíðarvánirnar vóru alt annað enn góðar. Eg minnist enn hvussu ofta sagt varð, "hetta er liðugt". Vit føroyingar skulu liva av fiski so ella so, eisini í vánaligum tíðum. Og eg vóni til Hin almáttuga, at vit ongantíð koma til ta niðurstøðu at "her fiskast ikki meir". Tá verður svangligt. Tað sum eisini ger at vit stíga fram í treysti, er fólkið sum er knýtt at reiðarínum bæði á sjógvi og á landi. Fleiri av monnunum hava ein førning við sær, sum ikki kann keypast.

- Vit eru avgjørt bjartskygdir um hetta skip. Sundaberg veiddi í fjør fyri góðar 92 milliónir krónur. Hetta skipið skal veiða fyri 65 milliónir fyri at standa seg. Rentustøðið er metlágt í løtuni er niðri á fimm prosentum. Tá Skálaberg kom í 1989 var rentan uppi á 14 prosentum. Tað er stórur munur á at reka skip við so lágari rentu, sigur Hanus Hansen.

- Nýggi Skálaberg gevur okkum eisini munandi betri møguleikar at fáa munandi meira burtur úr fiskinum. Tað snýr seg ikki bara um at fáa nógv tons, tað snýr seg um at fáa so nógv sum gjørligt burturúr hvørjum tonsi. Eitt nú hevur Skálaberg eina sera stóra verksmiðju, sum slett ikki er liðugt útbygd enn. Har eru nógvir framtíðarmøguleikar. Eitt nú kunnu vit gera 120 tons av krapaísi um dagin og fyrstiorkan er stór. Hetta skipið kann fiska hvar tað skal vera í heiminum. Tað er ísforstyrkt í høgum klassa og tað hevur aircondition so vit kunnu fara í tropurnar um tað skal vera, sigur Hanus Hansen.

- Vit eru eisini sera spentir upp á at vita hvussu trítrolið fer at roynast. Hetta er heilt nýtt innan toskaveiðu og her liggja stórir møguleikar. Flótitrolið víðkar eisini um møguleikarnar hjá bátinum.

Skálaberg hevur verið ein tungur burður. Fleiri trupulleikar hava verið undir bygging og skipið er seinkað nógv. Reiðarin heldur ikki at hetta fer at nerva framtíðarmøguleikarnar hjá trolaranum. Sjálvur hevur hann lagt allar sínar royndir á sjónum bæði sum maður, stýrimaður og skipari í nýggja skipið.

- Skálaberg er eitt teamwork frá a-z. Fólkið hevur verið trúfast hjá Kjølbro og vit hava fólk við einum førningi, sum ikki kann keypast. Og tað er okkara dugnaliga fólk, fleiri av teimum hava brúkt alt vaksna lívið umborð á okkara trolarum, sum hava saman hava skapað nýggja Skálaberg. Hann er gjørdur eftir okkara høvdið og tað eru nógvir sum hava havt eina meining og sum hava havt ávirkan meðan skipið hevur verið í gerð, sigur Hanus Hansen.



# Hevur siglt tríggjar nýbygningar á Klakksvík

*Hatturin situr á 71 ára gamla Jaspur Klakkstein úr Klakksvík, sum hevur ført tríggjar nýbygningar til Klaksvíkar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



SKÁLABERG

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

- Eg havi verið við til at ført tríggjar nýbygningar til Klaksvíkar, so eg veit hvussu tað kennist hjá reiðaranum og manningini, nú hesin veldigi trolarin er komin til landið, sigur 71 ára gamli Jaspur Klakkstein úr Klaksvík

Áðrenn nýggi Skálaberg legði at á Kósabrúnni mánakvøldið, sást ein heldur lágvaksin maður ganga uttanfyri brúnna umborð. Hann var í hvítari skjúrtu, eitt sindur reyðdæmdur og hevði ein grønan veiðuhætt á høvdinum, ein av teim skotsku sum Sofus Poulsen, umboðsmaðurin plagar at ganga við. Og við at spyrja eitt sindur á brúnni, fekkst at vita at talan var um gamla fiskimannin Jaspur Klakkstein úr Klaksvík. Løtu seinni eydnaðist tað okkum at fáa tal á mannin inni í salongini umborð á Skálaberg.

- Hendan bátin havi eg mót um. Tað er heilt sikkurt, at hetta fer at ganga. Var eg ungur í dag, so hevði eg eisini torað undir hetta verk. Trolarin hevur stóran motor og tað hevur alt at siga, sigur 71 ára gamli Jaspur Klakkstein og hann veit hvat hann tosar um, tá hann tosar um skip.

-Í 1964 fingu vit fyrsta Nónhamar. Hann var línubátur og bygdur á Skála Skipasmiðju. Í 1968 kom línubáturin Borgarin og í 1976 kom saltfiskatrolarin Nónhamar. Eg haldi, at reiðaríið hevur gjørt rætt at gera so nógv burturúr hesum trolaranum. Her verður gott at vera við. Eg havi verið við yviri í Noregi eftir bátinum. Bara verið við sum gestur. Hanus bjóðaði mær við og eg tók av beinanvegin. Eitt stásskip, gekk 17 míl og so er sjálvbetjening umborð tá vit skaffa, sigur Jaspur Klakkstein og ristir undrandi við høvdinum. Hetta er sum eitt fínt hotell.

Hann hyggur kring seg í salongini. Her síggjast allir trolararnir hjá Kjølbro sandblástir inn í glas. Hann minnist teir allar, teir eru meitlaðir inn í ta tilvitaðu søgufatanina hjá hvørjum einasta klaksvíkingi, íð hevur nakað upp á seg.

- Eg byrjaði hjá Kjølbro í 1950. Fór við Sjúrðaberg, sigdi 12 ár við Kaj Johannesen, áðrenn eg fór umborð á skip, sum eg sjálvur var parteigari í.Var eg ungur í dag, so hevði eg gjørt tað umaftur, sigur Jaspur, meðan fólkið hyggur eftir stásiliga skipinum.

# Nýbakað hvønn morgun

SKÁLABERG

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Sosialurin, Klaksvík:** Tá íð morgunvaktin umborð á Skálaberg kemur upp og fer út á gongina er deymurin av nýbakaðum bollum ella rundstykkjum tað fyrsta sum rekur fyri nasarnar og soleiðis verður tað hvønn morgun, stendur tað upp til 26 ára gamla Hans Paula við Misá úr Vági, sum er annarkokkur umborð á Skálaberg. Hann er upprunaliga bakari og hevur verið kokkur við Enniberg í fýra ár. Nú er hann saman við Heina Ósá, sum er fyrsti kokkur og teir kennast, báðir hava siglt við Enniberg.



*Báðir kokkarnir umborð á Skálabergi. F.v. Heini Ósá og Hans Pauli við Misá*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Teir hava kokkast eina viku umborð á nýggja Skálaberg og tá lesarin lesir hetta, eru teir ordiliga farnir til arbeiðis, tí tá skuldi Skálaberg verið á veg í Irmingarhavið á kongafiskaveiðu millum aðrar stórar trolarar, russiskar, polskar, íslendskar og aðrar.

- Her er arbeiðsligt og her liggur væl fyri, sigur Hans Pauli við Misá og vísir runt í galluni. Vit hava ikki enn roynt galluna í rulli, men tað kann ikki vera verri enn við øðrum skipum, sigur hann.

Teir báðir kokkarnir skulu syrgja fyri at manningin fær góðan mat, men teir skulu eisini ansa eftir at maturin ikki er ov dýrur.

- Vit hava loyvi at gera mat fyri 80 krónur pr. mann um dagin. Men so nógv brúka vit sjálvdan. Provianturin fer av felags áðrenn býtt verður. Hendan túrin proviantera vit bert til ein mána. Vanliga, tá vit eru eystanfyri, so verður provianterað til tríggjar mánaðar, sigur Hans Pauli við Misá.

- Manningin á Skálaberg vil hava ordiliga mat, og teir leggja lítið í grønmeti. Vit baka eisini at tað vanliga, sum tú kann keypa í einum bakaríi og køkurnar ganga sum heitt breyð, sigur Hans Pauli við Misá og er um at gerast í ørviti av øllum gestunum.